# Torstein hevur ein verndareingil

**Herfyri spældu átta ára gamli Torstein og nakrir av hansara vinmonnum í einari gamlari grund í Vestmanna, tá Torstein brádliga datt einari fimm ella seks metrar niður og lendi á sjógvi. Torstein kom ótrúliga væl frá óhappinum, og fleiri eru tey, ið siga, at mestur man ein verndareingil hava havt eyguni eftir honum**



*Fallið hjá Torsteini var um seks metrar ella so. Tíbetur var flóð hendan dagin, og tískil var stoyturin ikki so harður*

Mynd: Jens K. Vang

ÓHAPP

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Torstein Paulason Brattaberg slapp við skrekkinum, tá hann tann 21. oktober kom út fyri einum óhappi, sum kundi volt honum stóra skaða. Meðan hann og nakrir vinmenn spældu í einari gamlari húsagrund, datt hann brádliga út av og lendi í sjónum einar seks metrar niðriundir. Vanliga er hella undir, men tíbetur var flóð hendan dagin, so sjógvurin tók tað mesta av stoytinum, tá hann lendi. Hann fekk nakað av skaða í andlitið, men annars kom hann væl frá fallinum.

– Júst hvat hendi, er ikki heilt greitt, men har lá ein planki, sum Torstein antin hevur sett seg ella traðkað á, og so fór hann sendandi útav, greiðir mamma Torstein, Barbara Brattaberg, frá.

Í fallinum smekkaði Torstein høvdið í sjálvan veggin í grundini, og tá er hann so svímaður. Sjálvur greiddi hann frá, at hann svímaði, tá hann datt, men vaknaði aftur, tá hann lá í sjónum.

### Hjálp var í nánd

Dreingirnir, sum vóru við Torsteini, søgdu, at Torstein sjálvur svam stutta teinin inn á land, men hesum er Torstein ikki samdur í. Hann sigur, at tað kendist um ein alda tók í hann og flutti hann inn á land.

– Tað er sjálvandi torført at siga, júst hvat og hvussu. Hetta eru jú børn, sum vit tosa um, og tey uppfata uttan iva eina slíka støðu á hvør sín hátt, heldur Barbara fyri.

Men hvussu er og ikki, so kom Torstein í øllum góðum upp á turt aftur.

Tað vildi so væl til, at nakrir menn vóru til arbeiðis har í nánd, og vinmenninir hjá Torsteini róptu á teir og bóðu um hjálp.

Teir fingu fatur á dronginum, sum tá var illa skjølaður, vátur, kaldur og bløddi sera illa.

Við bili varð so farið úr Vestmanna. Teir ringdu til Paula, pápa Torstein, sum arbeiðir í Havn. Avrátt varð, at Pauli skuldi koyra ímóti teimum. Við rundkoyringina í Kollafirði hittust teir, og Pauli tók sonin í sín bil og koyrdi so beint á Landssjúkrahúsið.

### Ómetaliga heppin

Menninir í hinum bilinum ringdu so til Barbaru og boðaðu henni frá, at sonurin og maðurin vóru á veg á skaðastovuna. Barbara arbeiðir á Tjaldursapotekinum, og hon var ikki komin út um Havnina, tá hon fekk boðini. So hon koyrdi beint á sjúkrahúsið og var har, áðrenn Torstein og maðurin komu.

– Eg bleiv ikki so bangin, tí teir dugdu avbera væl at siga mær, hvat var hent. Teir løgdu mær eina við, at tað sá nógv ógvusligari út, enn tað í veruleikanum var, greiðir Barbara frá.

Hon rósar bæði monnunum, sum komu Torsteini til hjálpar og øllum á sjúkrahúsinum upp um øll skýggj fyri teirra fyrimyndarliga góðu hjálp í sambandi við óhappið hjá einasta soninum hjá teimum.

Torstein varð liggjandi á Landsjúkrahúsinum eina nátt. Staðfest varð, at hann ikki hevði fingið stóran skaða. Knoglin undir vinstra eygað hevði fingið eitt knekk. Av tí sama var hann sera hovin í andlitinum. Hann fekk eisini nakrar pentir undir undirvørrini, men tað var alt.

– Tá man hugsar um alt, sum kundi havt hent, so kunnu vit ikki siga annað enn, at hann var ótrúliga heppin, sigur Barbara.

Tað letur ikki til, at Torstein fekk nakran ógvusligan skelk av óhappinum. Ta fyrstu náttina á sjúkrahúsinum droymdi hann eitt sindur, men annars hevur hann ikki havt órógv av fallinum. Barbara heldur tó, at onkur av vinmonnunum hjá Torstein ikki høvdu tað so lætt tær fyrstu næturnar aftaná.

– Tað hevur uttan iva verið ein ógvusligur skelkur fyri teir at vera vitni til eitt slíkt óhapp, sigur Barbara. Torstein hevur ei heldur trupulleikar við at fara aftur á staðið, har óhappið hendi, so har hevur hann longu verið aftur fleiri ferðir.

### Ótrúligur stuðul

Barbara sigur, at øll vita, at óhappið er hent. Bygdafólkið í Vestmanna vísti ein ótrúligan stuðul, sigur hon. Flokkurin hevur verið á vitjan, øll ringdu fyri at spyrja, hvussu tað stóð til, og sum sagt eru tað mong, sum hava havt á tungu, at ein Torstein hevur ein verndareingil.

Talan var um eitt hendiligt óhapp hendan dagin. Børn spæla so nógv og nógvastaðni, og her mundi tað endað galið.

Barbara heldur ikki, at tað veruliga er gingið upp fyri henni enn, hvussu heppin tey hava verið.

– Sjálvandi hugsar ein um alt tað, sum kundi hent. Hann kundi havt sligið seg í á ein annan hátt og harvið brotið seg nógv verri sundur, heilaskjálvti og hvat veit eg. Og um ongin flóð var, eg tori næstan ikki at hugsa tankan. Men tíbetur var hansara tíð ikki komin, og sigast má, at tá tað skuldi vilja illa til, kundi tað hóast alt ikki gingið betur. Tað eru vit ómetaliga takksom fyri, sigur Barbara Brattaberg.



*Pauli, Barbara og Torstein eru ómetaliga takksom fyri, at alt spældi so væl av við óhappinum hjá Torsteini*

Mynd: Jens K. Vang



*Knoglin undir vinstra eygað hjá Torsteini fekk eitt knekk, tá hann smekkaði seg í. Hann var rættiliga hovin ta fyrstu tíðina, men tað legði seg skjótt*

Mynd: Jens K. Vang

# ítróttur

Nr. 209 • týsdagur • 2. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Føroyingar gott fótafesti í toppinum

**Horsens og Frem fingu fult, meðan tað eftir stinna kappingarbyrjan er gerandisdagur hjá Fremad Amager og føroysku spælarunum á Amager, sum ikki eiga pláss millum teir fyrstu ellivu**

DANMARK 1. DEILD

*Jóannes Hansen*

Tað gongur ógvuliga væl hjá Horsens og Frem. Hesi bæði feløgini eru á uppflytingar plássunum, og í vikuskiftinum fingu tey bæði fult. Johan Byrial Hansen og Horsens vóru í Næstved, har tað eydnaðist at vinna sannførandi 3-1.

Mikukvøldið tapti Frem 2-0 á heimavølli móti Skjold. Tað var í steypakappingini. Leygardagin hittust feløgini aftur. Tað var í landskappingini og á Eysturbrúgv, har Skjold heldur til. Frem hevndi tapið í steypakappingini so dyggiliga. Teir vunnu ikki minni enn 4-0. Jón Rói Jacobsen var á vølllinum allar 90 minuttirnar. Hann taldist ikki millum málskjúttarnar hesa ferð. Í 10. minutti fekk hann gult kort.

Fremad Amager hevði vitjan av Fredericia. Úrslitið var málleysur javnleikur. Eftir at teir eitt skifti vóru á uppflytingarplássi, er Fremad Amager nú dottið niður á sjeynda plássið, men tað er ikki so langt fram á triðja plássið. Hesa ferð var eingin føroyingur millum teir fyrstu ellivu. Andrew av Fløtum varð skiftur inn beinanvegin eftir steðgin, og Hjalgrím Elttør varð skiftur inn, tá ið tað restaði eitt korter. Fram ímóti dystarenda vildu teir á heimaliðnum hava brotsspark, tí Andrew av Fløtum fór um koll, men tað var dómarin ikki samdur við teimum í.

SønderjyskE og Vejle eru væl við í kappingini um bestu plássini. Hesa ferð vann Vejle 3-0 á heimavølli móti HIK, sum í fyrstu umførunum stóð seg óvanliga væl. Nú er HIK á sætta plássinum — eitt pláss frammanfyri Fremad Amager.





*Tað er føroyskur dámur í toppinum av næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Johan Byrial er fastur maður á liðnum hjá Horsens, sum er á odda í deildini. Nummar tvey er Frem, har Jón Rói verður mettur sum týðandi partur av stinnu verjuni*

## Kendir málskjúttar

**Fyrrverandi føroyski landsliðsspælari ger nógv um seg í Lyngby**

DANMARK 2. DEILD

*Jóannes Hansen*

Tað gongst væl hjá Christian Lamhauge Holst. Hann er í álopinum hjá Lyngby, sum spælir í triðju bestu donsku deildini. Í fjør helt Henrik Larsen, sum spælir oldboys fótbólt í Lyngby, har hann hevur sína dagligu gongd, at Christian var ein møguleiki á føroyska landsliðnum, og hann varð úttikin.

Í ár hevur Christian ikki verið á landsliðnum. Men hann hevur skorað nógv mál fyri Lyngby, og aftur í vikuskiftinum var hann í brennideplinum. Lyngby vann 4-1 á útivølli móti Holsterbro, og Christian Lamhauge Holst skoraði tvey mál.

Ein annar gamal kenningur í Føroyum skoraði eisini í 2. deild í Danmark.Karsten From, sum í fjør spældi bæði við HB og NSÍ, spælir nú við Kolding, og hann skoraði einsamalla málið, tá ið Kolding í vikuskiftinum hevði vitjan av Glostrup

### Seinastu spurningarnir avgreiddir

Seinasti dysturin um upp- og niðurflyting varð avgreiddur í farnu viku. Dysturin stóð millum Skála, sum gjørdist næst aftust í triðju deild og GÍ, sum vann silvur í fjórðu deild. Skála vann báðar dystirnar, og halda teir soleiðis fast um sessin í triðju deild, meðan gøtumenn mugu bíða í øllum førum eitt ár, áðrenn hetta skal eydnast teimum.

**-jm**

### Skiftið hjá Niclas staðfest

Í farnu viku skrivðu vit, at tað eftir øllum at døma fór at eydnast B36 at knýta Niclas Niclasen úr KÍ afturat besta hópinum. Fríggjadagin kundi B36 so á heimasíðu sínari staðfesta skiftið. Soleiðis verður tað helst hann, sum saman við Pól Thorsteinsson fer at manna miðverjuna hjá B36 komandi kappingarár.

**-jm**

### Útlendingarnir hjá ÍF verða verandi

Tað hevur ikki verið nøkur loyna, at fleiri av føroysku fótbóltsfeløgunum hava ligið framvið eftir undirskriftunum hjá Ahmed Sylla og Gunnar G. Nielsen, sum í ár hava leikt fótbólt við ÍF.

Soleiðis skrivaðu vit í leygardagsblaðnum, at B36 hevur sýnt leikarunum stóran áhuga. Og sum skilst, so høvdu teir báðir eisini hugt at umstøðunum í B36.

Men tað skiftið verður so av ongum nú. Úr Fuglafirði eru boðini, at leikararnir í dag hava gjørt nýggjan sáttmála við ÍF, har teir soleiðis eisini fara at spæla fótbólt komandi kappingarár.

**-jm**